**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 14 |
| Tíð: | 10-11-22 klokkan 13:00 - 14:30 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Katrin Holm, forkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Petur Rouch, skrivari, Marin Rasmussen, limur.
Robert Vilhelmsen kundi ikki møta.

**Fundarskrá:**

1. Gjøgnumgongd av fundarfrágreiðing frá fundi við borgarstjóran tann 25. oktober 2022.
2. Komandi fundur við borgarstjóran 12. desember 2022.

<u>AD 1 Gjøgnumgongd av fundarfrágreiðing frá fundi við borgarstjóran tann 25. oktober 2022</u>

Fundarfrágreiðingin varð lisin og góðkend.

Eldraráðið mælir ikki til, at Tilhaldið verður flutt aðrastaðni vegna atkomumøguleikar. Hinvegin eiga atkomumøguleikar at tillagast til at samsvara altjóða ásetingum, so atkomumøguleikar til almennar bygningar hjá rørðslutarnaðum verða hildnir.

Hinvegin ásanna vit, at bygningurin er søguligur, so broyting í atkomumøguleikum skal hava fyrilit fyri hesum.

<u>AD 2 Komandi fundur við borgarstjóran 12. desember 2022</u>

Eldraráðið skjýtur upp, at fundurin við borgarstjóran 12. desember 2022 verður klokkan 17 og matur verður klokkan 18.

Komandi fundur verður 8. desember 2022 í Tilhaldinum.

Tórshavn 11. november 2022.

Petur Rouch,
skrivari